# Norðbúgvin var í altjóða sjógvi

**Tað undraði kanska onkran lesara, sum fylgir við á økinum, at Norðbúgvin, sum er ídnaðarskip, skal hava fiskað svartkjaft til ídnað í føroyskum sjógvi, sum vit skrivaðu í blaðnum hósdagin. Tí ídnaðarskipini mugu ikki fiska undir Føroyum. Tað hevði Norðbúgvin heldur ikki gjørt, sigur reiðarin**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*


*Norðbúgvin hevði fiska svartkjaftin, hann landaði í Fuglafirði í vikuni, í altjóða sjógvi*

Tá Norðbúgvin týsdagin landaði svartkjaft í Fuglafirði, var tað veiða, sum fingin var í altjóða sjógvi, og ikki í føroyskum, sum annars sagt varð í hósdagsblaðnum.

Tað er soleiðis, at Norðbúgvin er ídnaðarskip, og hevur sum slíkt ikki loyvi at fiska svartkjaft til ídnað undir Føroyum.

Í fiskiloyvinum hjá skipinum stendur, at Norðbúgvin í tíðarskeiðnum frá 21. mai til 31. december í ár hevur loyvi at at reka trolveiðu eftir svartkjafti á ytru landleiðini til matna.

Tí undraði tað, at skipið landaði 600 tons av svartkjafti í Fuglafirði, samstundis sum sagt varð, at hesi vóru fiskað í føroyskum sjógvi. Um so var, skuldi tey heldur verið løgd upp til frystivirkið í Kollafirði.

Bjarti Mohr, reiðari á Norðbúgvanum, sigur, at tað var ein misskiljing sum skrivað var, tí skipið hevði verið í altjhóða sjógvi og fiskað hendan svartkjaftin.

Hinvegin hevur Norðbúgvin eisini verið í Kollafirði einaferð við svartkjafti, sum ætlanin var at landa til matna. Men virkið har vísti fiskinum frá sær, tí hann var ikki nóg góður til matfisk. Sostatt fór tann lastin eisini til ídnað.

Av Fiskiveiðieftirlitinum verður váttað, at tær fráboðanir, sum hagar eru komnar frá Norbúgvanum, siga, at hann hendan túrin var í altjóða sjógvi. Tey hava lagt merki til, at sagt hevur verið, at Norðbúgvin hevur landað svartkjaft undan Føroyum í Fuglafirði. Tey hava tó ikki verið umborð á skipinum og kannað dagbøkurnar, verður sagt av Fiskiveiðieftirlitinum.

Norðbúgvin hevur fylgisveinaútgerð umborð, sum ger, at til ber at fylgja skipinum alla tíðina. Men tey sakna tó lóggávuna, sum skal vera á økinum, siga tey á Fiskiveiðieftirlitinum. Men tó er at siga, at tann lóggávan er á veg.

# Tekja skúlan og høllina

**Skúlin og ítróttarhøllin í Trongisvági verða takt av nýggjum. Talan er um arbeiði fyri eina tvær milliónir krónur**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Tvøroyri:** Skúlin og ítróttarhøllin í Trongisvági verða takt av nýggjum. Økið er stórt, og tað kostar nógvar pengar, sigur borgarstjórin. Einar tvær milliónir væntar hann, at tekingin fer at kosta kommununi.

Bygnignuri n er 20 ára gamla og er taktur við stáltaki, sum varð ræ ttiliga illa rustað og farið var at leka í høllini, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri. Tí var neyðugt við eini umvæling, og valt varð so at tekja allan bygningin, sum hann er, av nýggjum. Lagdar verða tróðurplátur niður á gamla takið, og so takt omanyvir.

Eisini gamli skúlin úti á Tvøroyri varð taktur av nýggjum í fjør, so nú skuldu skúlarnir verið tættir uttan, sigur hann. Men innan er okkurt at gera av viðlíkahaldi, sum neyðugt er, og farið verður undir tað nakað skjótt, sigur borgarstjórin.

Eitt annað sum Tvøroyrar Kommuna hevur gjørt í summar, er umvæling av gomlu træbrúnni á Hvítanesi. Hvítanesbrúgvin stendur á steyrum, og var av slíkum slagi, at skilagott varð hildið at varðveita hana.

Umsókn kom frá nøkrum borgarum um at sleppa at gera brúnna, men avgjørt varð, at kommunan skuldi standa fyri hesum. Nýggir steyrar eru slignir niður, so nú skuldi brúgvin verið trygg nakað væl fram í tíðina, heldur borgarstjórin.

Annars liggur asfaltarbeiði fyri. Nýggivegur, tað er framhaldið av Ovaravegi undir Kvalinum inn í Trongisvág, skal asfalterast.

Manglandi bryggjupláss er altíð ein trupulleiki, og neyðugt hevur verið at fylt út á sjógv fyri at fáa uppland, greiðir Finnleif Guttesen, borgarstjóri, frá. Fylt er út uttan fyri Fiskavirking.

Tað er rættiliga nógv viðlíkahald, sum gerast skal í einum nú. Men tað kemst av fíggjastøðuni, kommunan var í eftir kreppuna. Alt ov nógv hevur ligið á láni í ov langa tíð, orsakað av hesum, og tí kemur tað nú upp í røkur, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

Av nýgerð er ikki tað stóra. Men vatnleiðing liggur alla tíðina fyri. Ymsir privatir brunnar hjá onkrum vatnfeløgum eru enn á Tvøroyri, men gongdin er, at alt skal koma undir kommununa. Og tað er neyðugt, tí turkurin, sum verið hevur í summar, hevur rættiliga kenst hjá summum teirra, sum hoyra til hesi vatnfeløgini, og tað ber jú ikki til, sigur borgarstjórin.


*Teir tekja ítróttarhøllina og skúlan í Trongisvági. Hetta er arbeiði, sum fer at kosta einar tvær milliónir krónur, sigur borgarstjórin ímTvøroyrar Kommunu*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Skeivt felag nevnt sum eigari

**Í grein um bátastevnunna á Tvøroyri, sum var í blaðnum tann 7. august, varð skeivur eigari uppgivin, tá gamli Tvørabáturin, sum í dag er í Danmark, varð umtalaður**

RÆTTING
*Edvard Joensen*

Í grein um Bátastevnuna á Tvøroyri varð nevnt, at tað var róðrarfelagið í Ishøj í Danmark, sum eigur 10-mannafarið gamla Tvørabátin, sum luttók á stevnuni.

Tvøramaðurin Ólavur á Heygum, sum býr í Danmark og er virkin innan róður har niðri, hevur vent sær til blaðið og gjørt vart við, at tað er ikki so.

Tað er felag, sum nevnt verður »Bátsmanningin 10-mannafarið Tvørabáturin«, ið heldur til í Norðhavnini í Keypmannahavn, sum eigur Tvørabátin, og eisini luttók á bátastevnuni við honum. Ólavur á Heygum bað okkum eisini gera vart við, at í tøkkini, hann vegna stevnuluttakararnar hevði í Sosialinum tann 14. august, hevði hann av misgáum gloymt ein av góðu stuðlum teirra, sum uttanlands komu.

Tað er Skipafelagið Føroyar, sum stuðlaði teimum við at flyta Tvørabátin millum londini.

Felagið takkar Skipafelagnum hjartaliga fyri stuðulin.



VIÐMERKINGAR

# Tey giftu og tey ógiftu

**Finnur Helmsdal**



Seinastu tíðina hevur enn eina ferð verið nomið við spurningin, um hvussu forsorgarlógin ger mun á giftum og ógiftum. Hesa ferð er vinkulin settur á, at tey giftu ikki kunnu fáa tað sama, sum tey ógiftu fáa. Aðrar tíðir hevur vinkulin verið, at tað líkist ongum, at fólk, ið liva sum gift, allíkavæl fáa frá tí almenna.

Sum so mangan áður hava nógv verið frammi og sagt sína hugsan um hesi viðurskifti. Soleiðis er vanliga, tá eitt hvørt órættvísi er at hóma. »Hatta er vanærulig skomm, hatta má og skal broytast«, er í stuttum tað, flestu hava sagt.

Seinasta boðið er komið frá Kristiani Magnussen, løgtingsmanni, sum man teljast millum tey fáu, ið hava veruligt innlit í sosiallóggávu okkara. Kristian verður í Sosialinum siteraður fyri at siga, at fólk skulu vera líka fyri lógini, og tí skal grein 2 í forsorgarlógini strikast. Grein 2 í hesi lóg snýr seg, at øll vaksin hava skyldu í mun til ta almenna, at forsyrgjaraskyldan, sum er ásett í rættarvirkningslógini, verður handhevað, tá stuðul við heimild í forsorgarlógini skal útgjaldast. Nú rokni eg við, at Kristian ber hugsar um tann partin av forsyrgjaraskylduni, sum er galdandi millum vaksin fólk og ikki hana mótvegis børnunum.

Uppskotið frá Kristiani er ein máti at fremja rættvísi uppá, um vit eftir hondini yvirhøvur kunnu tosa um rættvísi í hesum sambandi. Tó loyvi eg mær at ivast í, um málið kann fáa eina so einfalda loysn. Forsyrgjaraskyldan finnist í so nógvum øðrum samanhangum, og so er hon eisini ein grundarsteinur undir sjálvum hjúnarbandinum og familjumynstrinum sum so. Spurningurin er, um vit kunnu strika so grundleggjandi viðurskifti burtur úr her men ikki har, og hvør verður avleiðingin. Spurningurin er tí, um okkara politikarar hava vilja og dirvi til at pilka við so grundleggjandi viðurskifti.

### Ein rættur

Ein av meginreglunum, forsorgarlógin byggir á, er forsyrgjaraskyldan. Verður hendan strikað, má eitt hvørt koma ístaðin. Tí lógin má byggja á ávísar meginreglur. Ein møguleiki er, at allar forsorgarveitingar byggja á faktisku støðuna, og at øll óansæð hava rætt til veitingina, ávísa støðan kann útloysa. Hetta merkir millum annað, at øll, sum ikki fáa síni børn ansað, eiga at fáa so og so nógv útgoldið við kassa 1. Gift ella ógift, sambúgvandi ella einsamøll.

Tá verða øll, sum m.a. Kristian Magnussen eftirlýsir, sett líka fyri lógini. Forsorgarveitingin verður ikki tørvsmett men ein treytaleysur rættur. Ein rættiliga dýrur rættur, sum fer at tryggja øllum, eisini bóndakonuni á útoyggj forsorgarhjálp vegna vantandi barnaansing, tí eingi tilboð um slíkt eru harúti.

### Gift ella ógift

Upp í hesum orðaskiftinum hava eisini verið hugsanir frammi um hjúnarbandið í mun til lógarverkið. Um lógarverkið og umsitingin av hesum ávirka giftingarhugin manna millum. Onkur hevur eeisni sagt sína hugsan, um tað loysir seg at giftast ella ei. Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður helt, at eittt nú forsorgarlógin neyvan ávirkar avgerðina, um fólk giftast ella ikki. Onkur prestur hevur sagt, at tað er burtur við at hava lógir, sum seta gift verri fyri.

Men hyggja vit at samlaða lógarverki okkara, síggja vit, at myndin kanska hvørki er eintýðug ella einføld. Við hvørt setir lógin gift verri fyri, men oftast betri fyri. Taka vit t.d. skattalógina, so varð hendan broytt dagarnar áðrenn tingið fór heim í vár soleiðis, at gift vóru sett nógv betur fyri. Hyggja vit í tryggingarlóggávuna síggja vit, at tað mest sum ikki loysir seg at tekna ávísar tryggingar ógiftur. Sama er galdandi fyri arvalógina, har ógift eru fyri veruligum vanbýti.

Ein viðkomandi spurningur aftur at er tí, um tað er rætt bert at tosa um, og møguliga broyta, forsorgarlógina í mun til hjúnarbandið. Eiga vit ikki at seta samlaða lógarverkið upp móti hjúnarbandinum. Í hvussu er um vit ætla at tosa um rættvísi.

Fari tí at mæla til, at spurningurin verður endavendur bæði ein og annan veg, áðrenn avgerð verður tikin um at strika grein 2 í forsorgarlógini. Ein kendur maður segði herfyri, at skal der være gilde, så lad… Fari at siga, at skal rættvísi valda, so skal veruligt rættvísi valda.

# Útnorðursfundur á Stykkishólmi

ÚTNORÐUR-SAMSTARV
*Eirikur Lindenskov*

Um vikuskiftið verður ársfundur hjá Útnorðurráðnum hildin á Stykkishólmi í Íslandi.

Á fundinum verður barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Útnorðurráðsins handað á fyrsta sinni. 3 bøkur eru innstillaðar, ein úr hvørjum landi. Tær eru ávikavist

**Grønland:** »Sialuarannguaq« – Jørgen Petersen

**Ísland:** »Sagan af bláa hnettinum« – Andri Snær Magnason

**Føroyar:** »Kuffan« – Brynhild Andreasen (tekst) og Astrid MacDonald (tekningar)

Luttakarar úr føroysku sendinevndini verða Jógvan á Lakjuni, formaður, Heðin Mortensen, Henrik Old, Heini O. Heinesen, Kári P. Højgaard og Rúni Hentze.


*Løgtingið*

*Savnsmynd*

3 starvsfólk
til Bónus í Tórshavn

Bónus sóknast eftur einum fólki at starvast fulla tíð, einum til hálva tíð og einum lærlingi til Bónus í Tórshavn at byrja skjótast tilber.

Talan er um størv við stórum avbjóðingum í einum mennandi og spennandi umhvørvi.
Tað er ein fyrimunur um tú hevur arbeitt í handli fyrr. Eisini vænta vit av tær at tú ert ábyrgdarfull/ur og arbeiðsom/samur.

Løn sambært S & K.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi, so ring til Janus S. Rasmussen á tel. 315 263.
Um hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn áðrenn 26. August.

Bónus er tann bíligasta handilsketan í Føroyum.
Á deildum okkara í Tórshavn, Klaksvík, Glyvrum og á Tvøroyri eru uml. 50 starvsfólk.

BÓNUS
Bónus • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 41

REINGERÐARFÓLK
til Kollafjord Pelagic P/F

Vit sóknast eftir reingerðarfólki til at vaska framleiðsluhøli og tól. Talan er um kvøld- og náttararbeiði

Viðkomandi skal kunna byrja skjótast tilber.

Áhugað kunnu venda sær til:

Kollafjord Pelagic P/F
Inni í Firði
FO-410 Kollafjørður
Tel 47 88 88

Kollafjord Pelagic